# Høgni Lisberg á toppinum

**Høgni Lisberg tryggjar ein føroyskan topp á 15 teimum bestu, ið annars eru merktar av nógvum útlendskum nøvnum hesa vikuna**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Lagið Learn To Ride On Waves hjá Høgna Lisberg hevur hesa vikuna lagt seg ovast á 15 tær bestu. Lagið hevur verið 10 vikur á listanum og hevur seinastu vikurnar ligið í millum trý tey ovastu løgini. Men hesa vikuna hevur frálíka lagið tikið seinasta stigið upp á ovastu rók.

Tá Høgni gav fløguna Morning Dew út fyri jól, druknaði hon í ein ávísan mun í øllum teimum nógvu føroysku útgávunum, men eftir jól hevur fløgan vunnið sær alt størri ans millum fólk. Hon gjørdist ársins fløga á Planet Awards og Learn To Ride On Waves gjørdist alt betur umtókt, hetta hevur flutt lagið alsamt hægrið upp eftir 15 teimum bestu.

Høgni hevur seinastu vikurnar spælt nakrar konsertir í Føroyum. Hetta er eitt slag av seinkaðum útgávu konsertum. Hetta kann vera ein av orsøkunum til at lagið tók hetta síðsta stigið upp á popptindin.

### Føroyskt Hip Hop

Ein annar føroyskir solistur Thor Simonsen roynir seg aftur hesa vikuna- á 15 teimum bestu við einum eykalagið. Fyri nøkrum vikum síðan royndi lagið Back It Up seg á listanum, men gjørdist ov stutt. Nú fær Thor enn ein møguleika. Ungi evnaríki Thor hevur sjálvur skrivað, spælt og framleitt fyrstu fløgu sína. Hip Hop fløgan fekk frálík ummæli í Planet blaðnum og er slóðbrótandi í føroyskum tónleiki. Fyrst og fremst er hon borin av góðum løgum, og feitari attitúdu. Hetta kemur serliga til sjóndar á lagnum, ið er eykalag hesa vikuna Faroes By Night, ið blandar føroyskt og enskt mál á ein stuttligan og rættiliga kulan máta.

### Ikki nógv føroyskt

15 tær bestu eru annars merktar av rættiliga nógvum útlendskum løgum. Umframt Høgna og lagið bert Poppkorn og lagið Droymi mitt um dagin inni á listanum, hesa vikuna er lagið á fimta plássi. Danski bólkurin Amazonair við føroyska gittarleikaranum Pætur Sivertsen og lagið Because Tonight á 10. plássi ger føroysku umboðanina eitt sindur betri.




FAMILJUPAKKI
Pakkið bilin heima í túninum, koyrið umborð og hugnið tykkum á ferðini. Soleiðis koma tit frísk og vælúthvíld til dyrnar á tykkara Danland frítíðardepli – fáar kilometrar frá Hanstholm, har Norrøna leggur at. Lættari gerst tað ikki. Danland hevur alt, sum krevst fyri at tit og børnini fáa eina ógloymandi viku saman.

2 vaksin og 2 børn v. bili til Danland úr
6.570,-

Íroknað er: Ferðin fram og aftur í 4 koyggjukamari v. wc/bað innv. Hartil uppihald í 2 verilsisíbúð á Danland í Blokhus ella Hirtshals. Eykakostnaður: Oljuavgjald kr. 120,- fyri hvønn ferðandi. Avgreiðslugjald kr. 120,- fyri bíleggingina. Fráferðir 06.04, 13.04 og 20.04.

UNDIRHALD UMBORÐ

Búktalarin Absalon Áargarð við Nikláa og hinum dukkudreingjunum undirhalda børnum og barnsligum sálum:
Tórshavn-Hanstholm 06.04
Hanstholm-Tórshavn 15.04

Angela og Hannibal:
Hanstholm-Tórshavn 08.04
Tórshavn-Hanstholm 13.04

Rok: Føroyar-Danmark 06.04-10.04

Jens Marni Hansen, Ólavur Øster og Jóhannus á Rógvu Joensen:
Føroyar-Danmark 13.04.-17.04

REPROZ

# Sjónleikarastevnan 2006

**10.- 11. mars verður Sjónleikarastevnan 2006 í Sjónleikarahúsinum, har aðalfundur, fyrilestur og skeið verða á skránni**

SJÓNLEIKARASTEVNA

Hetta er fyrstu ferð, aðalfundurin og sjónleikarastevnan verða hildin saman. Hetta verður gjørt fyri at fáa savnað so nógv, sum gjørligt av teimum mongu, sum fáast við áhugaleik, at tosa og kjakast um tey viðurskiftini, áhugaleikarar í felag virka undir.

Sjónleikarastevnan 2006 byrjar í Sjónleikarhúsinum fríggjakvøldið 10. mars kl. 19 við fyrilestri. Tað verður íslendska leiklistarkvinnan Sigrún Valbergsdóttir, ið hugleiðir um »Áhugaleikin - tá hann er bestur«.

Eftir fyrilesturin verður hugnaløta og kjak.

Leygarmorgunin 11. mars byrjar við aðalfundi í MáF. Hann verður frá kl. 10-12.

**Kl. 12.30** byrjar skeiðið, »Improvisation sum amboð«, ið býtt er í 3 partar:

**1.** Einstøk grundprinsipp í improvisation

**2.** Improvisation sum amboð hjá sjónleikarum og leikstjóra í venjingartíðini

**3.** Dreymaimprovisationir. Improvisation sum interaktivt amboð

Sigrún Valbergsdóttir skipar skeiðið við Eyð Matras, sjónleikarkvinnu, sum hjálpara.

**Kl. 17.30** verður eftirmeting, og kl. 19.30 byrjar veitslan.

Um Sigrúna Valbergsdóttir er at siga, at hon arbeiðir sum freelance leikstjóri og leiklistarpedagogur. Hon tók sjónleikaraprógv frá þjóðleikhúsinum í Reykjavík í 1970, las leikhúsfrøði í Køln 1975-78 og var leikhússtjóri í Alþýðuleikhúsinum 1980-82. Hon hevur verið formaður í Bandalag íslendskra leikfélaga (BÍL) 1983-89. Hartil hevur hon leikstjórnað fleiri enn 40 leikum, bæði yrkisleikum og áhugaleikum. Tvær sýningar hevur hon sett upp í Føroyum, »Framá« í 1989 og »Óvitar« í 1994. Hon hevur verið lærari á Leiklistarskóla Íslands og Leiklistarskóla Bandalags íslendskra leikfélaga. Eisini var hon kunningarstjóri í Borgarleikhúsinum 2001-2005.

Tað er Meginfelag Áhugaleikara Føroya, sum skipar fyri Sjónleikarastevnuni, ið er fyri allar sjónleikaráhugaðar føroyingar, ungar sum gamlar, royndar sum óroyndar í sjónleiki.

**Stað:** Sjónleikarhúsið í Havn

**Tíðarskeið:** Fríggjakvøldið 10. mars 2006 kl. 19.00 og leygardagin 11. mars 2006

**Kostnaður:** 300,00 kr.

Tilmelding: Hjá MáF, 315624 ella maf@maf.fo í seinasta lagi hósdagin 2. mars 2006.

# Poppkorn ovast á sølulistanum

**Útlendskur tónleikur var á øllum plássum á sølulistanum hjá 3'aranum uttan á ovasta plássi, har besti nýggi bólkur í fjør Poppkorn hava fest røtur**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fløgan hjá Poppkorn liggur hesa vikuna ovast á sølulistanum hjá 3'aranum, fløgan er júst endurprentað, aftan á, at tey fyrstu 3000 eintøkini vóru seld. Poppkorn vunnu í januar planetina sum besti nýggi bólkur og at døma eftir sølutølunum, sær tað út sum, um kornini enn eru glóðheit

Sølan av føroyskum tónleiki hevur ikki verið serliga sannførandi hesa vikuna, tí Poppkorn eiga einastu føroysku útgávuna á listanum. Nýggjasta útgávan hjá Toto er á øðrum plássi og savnsfløgan Accoustic Love Songs á triðja. Hetta er einasta savnsfløgan á listanum og tað er merkisvert, tí í nógvar mánaðar hava Now Music fløgur verið fastur fúsur á listanum.

At Eminem, James Blunt, Kelly Clarkson, Madonna, Katie Melua og Pussycats Dolls eru á listanum er eingin skelkur, men tað er áhugavert, at danska Nanna Amter og fløgan Stories Behind The Tear er komin inn á listan. Nanna er eitt rættiliga óskrivað blað í føroyskum høpi, hon hevur abba úr Sørvági og kom í sambandi við útgávuna av fløguni til Føroyar at spæla útgávukonsertir í Kagganum og í SMS næst seinasta vikuskiftið.

**nud**